

## Bumba við norska sendistovu

Einki starvsfólk á norsku sendistovuni í Kabul fekk skaða, tá ein bumba brast nærhendis sendistovuni í morgun. Afghanskir myndugleikar siga, at millum fimm og tíggju sivilfólk doyðu av spreingingini. Norski sendiharrin í Afghanistan, Kåre R. Aas, sigur við Bergens Tidende, at vindeygu og hurðar á sendistovuni vórðu trýst inn av bumbuni. Reuters skrivar, at tað var ein sjálvmorðsbumbumaður, sum sprongdi bumbuna. Maðurin sat í einum bili, tá hann sprongdi seg í luftina, skrivar tíðindastovan.

# Lærararnir vilja hava betri pensjón

**Føroya Lærarafelag er fyrsta stóra fakfelag, sum hevur gjørt av at flyta eftirlønarskipanirnar hjá limunum úr Lív yvir í Betri Pensjón**

EFTIRLØN
*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Betri Pensjón, sum er dóttTurfelag hjá Tryggingarfelagnum Føroyar, hevur júst gjørt eitt ordans hál.

Í seinastu viku samtykti nevndin í Føroya Lærarafelag at flyta eftirlønina hjá sáttmálaløntu lærarunum úr Lív yvir í nýggjara felagið Betri Pensjón.

Enn er ein partur av lærarunum tænastumenn, men í framtíðini verða allir lærarar sáttmálasettir. Eingir lærarar aftrat verða tænastumenn.

Lærarafelagi segði upp sáttmálan 1. juli í ár fyri at fara undir samráðingar við bæði feløgini. Sáttmálin gongur út á nýggjárinum.

Fleiri samráðingarfundir hava verið, og í seinastu viku samtykti nevndin at taka av tilboðnum frá Betri Pensjón.

Báði feløgini komu við góðum tilboðum, men Betri Pensjón hevði tað betra, sigur Magnus Tausen, formaður í Føroya Lærarafelag.

Í fyrstu syftu verður uppsparingin hjá lærarunum standandi í Lív. Serligar samráðingar skulu til, og tað kostar, at flyta hana.

### Hørð kapping

Í Lív harmast tey um at missa limirnar í Føroya Lærarafelag, sum er fyrsta fakfelag og stórt, ið flytir eftirlønir sínar úr Lív yvir í Betri Pensjón.

– Tað vísir bara, at kappingin er hørð, og at kappingin virkar, sigur Poul Christoffur Thomassen, fyrisitingarleiðari í Lív.



*Betri Pensjón kom við betra tilboðnum, sigur Magnus Tausen, formaður í Føroya Lærarafelag*

Hann hevur tó fegin um at hava fingið at vita frá lærarafelagnum, at Lív er fult kappingarført.

– Tað er spell, at Føroya Lærarafelag fer frá okkum nú, tí vit koma við fleiri spennandi tilboðum í 2010, sigur Poul Christoffur Thomassen.

Føroya Lærarafelag fer við øllum tryggingunum hjá limum sínum í Lív, eisini teimum, sum teknaðar vórðu fyri 2000 og hava landskassaveðhald.

Tað hendir javnan, at fakfeløg siga sáttmálan við Lív upp , tí løgfrøðiliga er ta neyðugt fyri at kunna samráðast um broytingar. Men ongantíð er tað áður hent, at nakað felag er farið úr Lív.

Beint nú hevur Lív samráðingar við nøkur fakfeløg, men ikki verður upplýst, hvørji tey eru.

UNDIR KONGAVARÐA

Raðhús til sølu

Nú verður farið undir at selja raðhúsini í 2 byggistigi Undir Kongavarða. Áhugin fyri húsinum er stórur, men tey sum standa á bíðilista hjá Tórshavnar Kommunu, hava fyrsta rætt til at keypa húsini. Eftir at lýsingin hevur staðið bløðunum hevur keyparin 14 dagar at koma við einari váttan um fígging og hvat nummar man er á bíðilistanum, og at undirskriva keypsavtalu. Eftir hetta verða húsini seld í fríari sølu.

Áhuga kunnu venda sær til:

P/F VALBJØRN DALSGARÐ
Rygsgøta 20 FO-160 Argir
Tlf 319279
Fartlf. 512118
fax 312118
valbjorn@valbjorn.fo
www.valbjorn.fo

INNI
Niels Finsensgøta 37
Postboks 364
FO-110 Tórshavn
Tel +298 354200
Fax +298 354201

